## VIÐMERKINGAR

# Norðoyatunnilin



**THORMUND JOHANNESEN**
klaksvíkingur, sum býr í Havn

29. apríl kvetti landsstýrismaðurin snórin. Norðoyatunnilin varð opnaður fyri ferðslu, og Klaksvíkin verður ongantíð hin sama aftur.

Nógv hevur verið sagt og skrivað um teir øktu møguleikarnar hjá klaksvíkingum og norðingum yvirhøvur, og tað er sjón fyri søgn at klaksvíkingar sanniliga hava tikið avbjóðingina í álvara, og liva mest sum í einum sigursælum rúsi í løtuni. Einaferð kemur gerandisdagurin tó aftur, um ikki hin sami gamli, við sigling um Leirvíksfjørð.

Sláa vit kalt vatn í blóðið, og hugsa okkum um. Hvat er tað so, sum er hent Klaksvíkini?

Jú, hvat samferðsluviðurskiftum viðvíkur, er Klaksvík nú næstan komin á sama støði, sum t.d. Fuglafjørður, Leirvík og Gøturnar hava verið á í mannaminni.

Eg sigi næstan, tí meðan samferðsluni til og úr t.d Fuglafirði ikki er álagt nakað gjald, skal ferðslan til og úr Klaksvík stríðast við eitt ikki so lítið tunnilsgjald.

Hettar er tann nýggi fløskuhálsurin hjá norðoyingum.

Klaksvíkin hevur staðið seg væl á vinnulívsøkinum líka síðani Kjølbro'sa tíð. Eftir kreppuna fyrst í nítiárunum, vístu teir yngru klaksvíkingarnir, at seiggið býr í teimum enn. Í staðin fyri at falla í fátt, brutu teir upp um armar, ikki bara hvør í sínum lagi, men stóðu eisini væl saman um at skaffa býnum sum mest av teim fiskiloyvum, sum nú vóru avmarkað. Á vinnulívsøkinum kemur Klaksvíkin tí helst at standa seg enn betur í framtíðini, takkað verið betri samferðslumøguleikum og kanska eisini tí nýggju havnini norðuri í Ánunum.

Við nýggju samferðsluviðurskiftunum koma eisini nýggjar avbjóðingar, og her er tað serliga í tænastuvinnuni, har klaksvíkingar enn spæla í eini lægri deild enn havnamenn, at tann veruliga kappingin kemur at standa. Ein kapping, ikki á jøvnum føti, orsakað av m.a. tunnilsgjaldinum.

Sum Firouz Gaini so væl segði tað í eini útvarpssamrøðu: "Hvørja ferð vit fáa eina samferðslubetring í hesum landi, styrkist Havnin". Hetta er helst veruleikin, um vit vilja tað ella ei, tí allir vegir føra til Havnar.

At tað so er bíligari at koyra suðureftir enn norðureftir, orsakað býtinum av kubbum, ger bara avbjóðingina enn størri fyri vinnuna norðanfyri.

Kanska hava vit lyndi til, í ov stóran mun, at síggja samskiftið millum útjaðara og miðøki sum kapping. Skulu vit ikki heldur hugsa samstarv?

Búsetingarmynstrið í hesum landi, sum upprunaliga var stýrt av møguleikum fyri jarðarbrúki og at rógva fiskimið, verður í dag stýrt av heilt øðrum viðurskiftum, sum gera, at vit dragast at, har mest fólk er. Býir og bygdir á Føroyakortinum, kunnu tí síggjast sum "fólkamagnetir", har tann størsta liggur í suðurstreymoy.

Vit mugu góðtaka tann veruleika, at vóru ikki undirsjóvartunlarnir lutvís fíggjaðir við bummgjaldi, høvdu vit helst ongar slíkar í dag, og tí kann ikki treytaleyst krevjast, at tunnilsgjaldið skal lækkast ella heilt falla burtur. Tó kann ikki noktast okkum at tosa um ymsar møguleikar fyri einum lægri gjaldi.

Verður fíggjarligt rásarrúm til tess, kann hugsast, at løgtingið játtar nakað av pengingi afturat til verandi undirsjóvartunlar í framtíðini. Men hetta vil sjálvandi verða sett upp ímóti, at hesin peningur helst er betur farin at útbyggja samferðslunetið suðureftir.

Ein einskiljing av tunlunum, kundi kanska latið upp fyri nýggjum møguleikum.

Er tunnilsgjaldið tað rætta?

Lækkar gjaldið, økist ferðslan, eru nokk øll samd um, tí fólk aftra við at koyra ov oftani, orsakað av tí høga gjaldinum.

Um ferðsluøkingin gerst lutfalsliga størri enn ein møgulig gjaldslækking, fær Norðoyatunnilin størri inntøkur við einum lægri gjaldi.

Meg lysti tí at vita, hvussu P/F Norðoyatunnilin er komin fram til, at júst verandi gjald gevur ta størstu inntøkuna.

Haldi meg hava hoyrt stjóran fyri P/F Norðoyatunlinum siga, at avskrivingarnar eru lagdar soleiðis, at tær samsvara avdrøgunum – 14 ár.

Hetta skilji eg ikki, tí avskrivingar og avdrøg hava jú einki hvørt við annað at gera.

Stjórin í Norðoya Sparikassa var eisini inni á hesum sama í útvarpssamrøðu, og helt at tunnilin hevði sama virði um 50 ár. Hesum gevi eg honum tó ikki rætt í. Hygg bara at tunlunum norður um fjall. Teir eru 40 ára gamlir, og tað eru longu nógv ár síðani, at teir vóru ótíðarhóskandi.

Ein háttur at meta 50 ár fram í tíðina, er at hyggja 50 ár aftur í tíðina, og síggja hvat hent er farna tíðarskeiðið. Tá sigldi Polaris, sum var minni enn Barðskor, um Leirvíksfjørð. Ja, Gud viti hvussu sær út um 50 ár, tí framburðurin er ikki steðgaður, men heldur fram við enn størri ferð, og er ikki lagt upp fyri honum, er livitíðin hjá Norðoyatunlinum kanska styttri enn hjá teimun norður um fjall.

Tó vildi eg mett, at í hvussu so er tey fyrstu 5 til 10 árini, heldur hann væl sítt virði, og nýtast tí lítlar ella ongar avskrivingar hesa tíðina.

Tá ið Skálafjarðartunnilin, um nøkur ár, opnar við yvirhálingsbreyt, fara fólk helst at ilskast um at liggja aftanfyri tað tungu ferðsluna, sum fer skríðandi upp brekkuna í Norðoyatunlinum. Tá ið umvælingar skulu gerast í einum tunli, við bert tveimum breytum, verður antin neyðugt at steingja tunnilin í styttri tíðarbil, ella aðra breytina, og stýra ferðsluni við ferðsluljósum. Hetta samanborið við tann komandi Skálafjarðartunnilin, við trimum breytum, sum kann viðlíkahaldast, uttan at ferðslan ávirkast stórvegis, fer at minka um virðið á Norðoyatunlinum.

Størsta virðislækkingin kemur tó tann dagin, tá ið tunnilin gerst ov lágur. Teir stóru bilarnir eru vorðnir, og koma eisini í framtíðini, at gerast hægri. Hetta sæst best við at hyggja at bilferjunum.

Gamli Smyril, sum varð smíðaður í 1968, hevði eina fríhædd á bildekkinum uppá 3,9 m.

Ternan (1980), hevði eina fríðhædd uppá 4,2 m, men gjørdist skjótt eisini ov lág.

Teistin (2001) hevur eina fríhædd á bildekkinum uppá 4,5 m, eins og Dúgvan og gamla Norrøna, sum var søgd at vera í lægra lagi, tá ið trailarar t.d. skuldu loysa vognin frá.

Á teim nýggju stóru bilferjunum, Norrønu og Smyrli, er bundið um heilan fingur, og lagt upp fyri, at bilarnir við tíðini gerast hægri. Fríhæddin er 5,0 m.

Hettar alt so vítt eg haldi meg minnast tølini, men tak meg ikki í tí!

Undirsjóvartunlarnir eru báðir 4,6 m til hæddar.

Nú oljan gerst alt dýrari, verður allastaðni hugt eftir møguleikum fyri at minka um oljunýtsluna. Ferðslan við trailarum eftir motorvegum kann gerast minni orkukrevjandi, um farið verður til størri eindir, og tað verður tí í dag royndarkoyrt við bilum sum eru 25,5 m til longdar. Størst loyvda longd í EU í dag er annars 18,6 m, minnist meg rætt. Hvussu høgir hesir royndarbilarnir eru, veit eg ikki, men nógv annað skal broytast um bingjurnar gerast hægri, men tað eru tær vorðnar fyrr, so hví ikki aftur?

Smyril og Norrøna eru fyrireikað til eina møguliga hæddarøking á stóru bilunum. Eru undirsjóartunlarnir tað ikki í sama mun, kann hetta gerast ein trupulleiki fyri Vágar og Norðuroyggjar.

Hesi viðurskiftini, eg her havi greitt frá, kunnu við tíðini gera, at virðið á Norðoyatunlinum fellur. Men, sum áður nevnt, liggur hetta helst, og vónandi, ikki ov fá ár frammi í tíðini, og inntil tann tíðin kemur, nýtist Norðoyatunlinum, eftir mínum tykki, lítlar ella ongar avskrivingar.

Tað sum er avgerandi neyðugt fyri norðoyingar er, at tunnilsgjaldið fer niður á eitt nøktandi støði, so at full nytta fæst úr tunlinum, meðan hann enn er tíðarhóskandi,.

Um 14 ár er tað kanska ikki tunnilsgjaldið, men tann manglandi yvirhálingsbreytin ella –hæddin, sum er fløskuhálsurin.

Ein skjót niðurgjalding av skuldini er avgjørt ein fyrimunur fyri P/F Norðoyatunnilin, og tí skilji eg væl argumentini hjá stjóranum.

Tess longur avdráttartíðin, tess størri rentubyrðan. Serliga tá ið partur av inntøkunum ikki fer til niðurgjalding av skuld, men til rakstur.

Men er hendan eyka rentubyrða ikki ein rættuliga góð íløga fyri vinnulívið í Klaksvík? Kanska kundi Klaksvíkar Kommuna verið við til at fíggja part av tí øktu rentubyrðuni, orsakað av einari longdari avdráttartíð, og á tann hátt fingið gjaldið niður og kappingarførið upp.

Um rætt er at leingja avdráttartíðina, veldst altso um eyguni, ið hyggja at tølunum.

### Til seinast

Havi dittað mær, sum leikmaður, at blanda meg upp í kjakið um Norðoyatunnilin, og eri komin inn á eitt øki, har eg kanska ikki havi tær røttu fortreytirnar fyri at úttala meg. Helst mistikið meg í fleiri førum eisini.

Meira ella minni tilvitað, havi eg kanska eisini gjørt ov mikið av í summum førum, men takið tað bara sum eitt vælmeint ískoyti til kjakið, tí at í einum fólkaræðisligum samfelag, er tað bara til fyrimuns, at fólk flest koma til orða.

# FSF og opinleikin



**JÓNFINN OLSEN**
Miðvágur

## FSF skal einaferð enn vísa sítt territorium, í Føroysku fótbóltskappingini

So hendi tað aftur, at FSF av sínum eintingum blandar seg upp í føroyskan fótbólt (12, maður á vøllinum ella ikki, tað kunna áskoðarnir sjálvir avgera).

Í fjørð var tað B-36 og KÍ. Í ár er tað so HB sum stendur fyri skotum frá FSF, dømt at tapa dyst av einum umsitingarligum hurlivasa, við tí úrslitið at teir ikki longur eru í steypakappingini, sjálvt um teir so ruddiliga vunnu á vøllinum.

FSF roynir at fáa øll leikaraviðurskiftir upp á pláss, so væntar ein eisini, at FSF vil hjálpa feløgunum, men ístaðin taka teir mál upp av sínum eintingum, meðan teir avgreiða onnur mál sum avgreiðslumál, tað løgna við hesum er, at málini er eins, ja hvør skuldi trú tí.

Tað ljóðar í miðlunum, at tað verður torført at taka støðu hjá dómsnevndini í hesum máli, men tað vildi eg ikki mett, tí at teir hava eitt undangongudømi frá des. 2004, tá dómsenevndin hevði eitt mál fyri sum var kært um ein leikara sum hevið leikt ólogligt í ikki minni enn tvey ár, men dómsnevndin segði soleiðis í úrskurði sínum, eg siteri »Annars er kærufreist leiki hansara í landskappingini 2004 viðvíkjandi runnin."

Men FSF loyvir sær eftir at brot og kærufreist er farin eftir grein 39 í kappingarreglunum og grein 8 í kappingini um løgmanssteypið at taka málið um HB upp av sínum eintingum sjálvt um felagið hevur øll skjøl viðvíkjandi spæliloyvinum hjá viðkomandi leikara talan her er um, men FSF sigur seg ikki hava mótikið nakað, hinvegin sigur felagi seg hava sent FSF neyðugu upplýsingarnar. Er FSF til fyri at hjálpa ella fyri at oyðileggja føroyskan fótbólt, eg spyrji bara og er kæru freistin ikki runnin.

Grein 39 stk. 3, sigur millum annað at "FSF kann eisini í serligum førum taka eitt mál til viðgerðar, um illgruni er um at eitt ávíst felag hevur framt brot á hesar reglur. FSF skal tá geva felagnum boð um hetta, áðrenn avgerð verður tikin", men er tað nakað felag sum hevur framt eitt brot í hesum føri, er tað ikki FSF sum vil spæla valdsharri og velja ikki at hjálpa við tí nú so nógv umtalaða opinleikanum sum teir tosaðu um á ársaðalfundinum, nú teir síggja at eisini ber til at gera feilir í FSF umsitingini, tí øll onnur skjøl eru til taks, tað eru bara tey í FSF umsitingini sum ikki finnast, eftir hvat skilst.

Spyrjast kann, eru tað bara nøkur einstøk feløg sum skula viðgerast eftir omanfyri nevndu grein (nevniliga Grein 39 stk. 3), ella orða á annan hátt, eru tað bara ávís feløg, ið koma undir hesa Grein 39 stk. 3. FSF kann siga okkum alment frá hvussu hetta hongur saman.

"Nógvir tankar kunna fara ígongd av hesi søk, men eg fari at steðga á her og bíða spentur um dómsnevndin fer at víkja frá sínum egna undangongudømi".

Hettar er ikki skriva sum álop á nakrar persónar. Men er aðalmálið hjá FSF at feløgini skula virkað runt landi, so er tað eitt ófrávíkiligt krav at FSF er ein viðspalari og hjálpir alt hvat tað er ment, og ikki er ein mótpartur, stongdur og afturlatin ella ein fíggindi hjá feløgunum. Men ein felagskapur sum er opin (OPINLEIKIN) og hjálpsamur so tað ítróttarliga kann verða sett í hásætið, ítróttinum at frama.

Við ynski um góða eydnu og eitt ítróttarligt ríkt fótbóltsár 2006, (tað sum eftir er av tí).